MENTAMÁLARÁÐIÐ

INNANHÝSIS

**Dagur:** 10. september 2009
**Skrátal:** 70-54100/2
**Máltal:** 060090 -/41

# Álit um savnsbygnað

**Mentamáladeildin**
**Dagført 10. september 2009**

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ (+298) 35 50 50 • 🖷 (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**Innihaldsyvirlit**

Tilmæli ... 3
Savnshugsjón ... 4
Almennu søvnini ... 5
Søvnini undir Mentamálaráðnum ... 5
Jarðfeingi (Jarðfrøðisavnið) ... 5
Havlívfrøðiliga Royndarstøðin (Mentamálaráðið) ... 5
Yvirskipaði bygnaðurin í dag ... 6
Landsgóðkend søvn og onnur søvn ... 7
Góðkend bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi ... 7
Skúla- og fólkabókasøvn ... 7
Onnur søvn ... 7
Gongdin viðvíkjandi søvnum ... 8
Uppskot ... 11
Ad. 1: Søvn Landsins ... 12
Ad. 2: Bygningar til felags fyrisiting, goymslur og framsýningar ... 13
Ad. 3: Samstarv um felags viðurskifti ... 14
Ad. 4: Rammulóggáva ... 14
Tíðarætlan ... 15
Kostnaðarætlan ... 15
Fylgiskjal 1: Upprit um samanlegging av Føroya Náttúrugripasavni og Havlívfrøðiligu Royndarstøðini ... 16
Fylgiskjal 2: Landssøvn, landsgóðkend søvn og onnur søvn ... 20

**Tilmæli**

Mælt verður til at

1. søvnini undir Mentamálaráðnum verða samskipað í eina yvirskipaða fyrisiting, nevnd Søvn Landsins. Fyrisitingarligar uppgávur hjá søvnunum verða lagdar til Søvn Landsins at umsita.

2. Søvn Landsins umsitur savnshøli hjá landinum, bæði umsitingarhøli, goymslur og framsýningarhøli. Løgd verður til rættis ein ætlan at betra um hølisumstøðurnar viðvíkjandi framsýningum og goymslum.

3. Søvn Landsins skal vegna landsstýrismannin í mentamálum samskipa savnsvirksemið í Føroyum.

4. til tess at fáa í lag eina miðvísa ætlan við savnsvirkseminum yvirhøvur, verður farið undir at fyrireika rammulóggávu fyri savnsvirksemið.

**Savnshugsjón**

Orðið ''savn'' hevur fleiri merkingar. Tann grundleggjandi týdningurin er ''ein samling'' ella ''tað, sum er savnað saman''. Men í yngri tíð hava vit eisini valt at geva tí eina aðra merking, nevniliga ''ein stovnur, sum á yrkisligum grundarlagi rekur savnsvirksemi'', t.d. bókasavn, skjalasavn, listasavn, fornminnissavn, náttúrugripasavn, miðlasavn, sjósavn, bygdasavn o.s.fr.

Tann grundleggjandi hugsjónin fyri savnsvirksemi, ið verður rikið á yrkisligum grundarlagi, verður nevnd ‘‘savnshugsjónin''. Teir grundleggjandi liðirnir í henni eru at 1) savna, 2) granska og 3) miðla ella veita savnstænastu. Virksemið er grundað á ásannan av, at savnsvirksemi hevur týdning fyri samleikakenslu hjá borgarum landsins og samfelagnum sum heild. Fyri trivnaðin, bæði í løtuni og yvir tíð, hevur tað tí týdning, at førdur verður ein tilvitaður og virkin savnspolitikkur.

Umráðandi fyri, at savnsvirksemið skal eydnast, er, at javnvág er millum teir tríggjar liðirnar í savnshugsjónini. Meginendamálið við innsavning er at skjalfesta tað, ið var, og tað, ið er. Meginendamálið við at granska tað, ið verður innsavnað, er at skilja og taka støðu við atliti at framtíðar samfelagsfatan og samfelagsmenning. Meginendamálið við at miðla og veita savnstænastu er at skapa alment umhugsni. Er ikki javnvág millum teir grundleggjandi liðirnar í hugsjónini, kámast virðið av virkseminum.

Tað grundleggjandi í savnsshugsjónini er at fyriskipa langtíðarminni samfelagsins. Uttan tað støðuga og systematiska grundarbeiðið, sum yrkissøvn gera við støði í savnshugsjónini, fæst ikki nøktandi grundarlag til at taka fyrisitingarligar avgerðir, t.d. viðvíkjandi mentanar- og náttúruumhvørvi við atliti at samfelagsútbygging í nútíðini á slíkan hátt, at fyrilit eisini verða sýnd framtíðar áhugamálum. Er ikki savnað, granskað og miðlað í góðari tíð og eitt grundstøði støðugt ment, eru vit sum samfelag og borgarar ikki fyrireikað at ganga framtíðar avbjóðingum um skilagóða samfelagsútbygging á møti.

Ein virkin og tilvitaður savnspolitikkur snýr seg tí um at sýna bæði fortíð, nútíð og framtíð virðing, soleiðis at eftirkomarar okkara í minsta lagi ikki hava verri fyritreytir enn vit høvdu at byggja hugsjónarligu tilveru sína á. Savnshugsjónin er ein týðandi liður í samleikaligu profileringini av samfelagi okkara, bæði fyri okkara egnu skuld og fyri fatanina í umheiminum av okkum. Søvnini eru tí andlit samfelagsins, og við tí ganga vit avbjóðingum, sum nýtíðar samvinna við umheimin setir, á møti, bæði í vísindaligum samstarvi og vinnu, t.d. ferðavinnu. Eitt virkið savnsumhvørvi hevur avgerandi týdning fyri leiklut Føroya í alheimsgerðini.

**Almennu søvnini**

Tey almennu søvnini, sum Løgtingið við íblástri frá hugsjónarfólkum úr Føroya Fróðskaparfelag setti á stovn í fimtiárunum, virkaðu eftir omanfyri nevndu savnshugsjón. Søvnini vóru Føroya Fornminnissavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Landsbókasavn og Føroya Náttúrugripasavn, sum fevndi um Djórasavn, Jarðfrøðisavn og Plantusavn. Eisini høvdu somu hugsjónarfólk leiklut í stovnseting av listafelag, sum seinni varð til Listasavn Føroya. Grundhugsjónin var, at hesi savnsvirksemi, bæði viðvíkjandi mentanararvi, náttúruarvi og listaarvi, vóru mentanarligir grundarsteinar í samfelagsbyggingini.

Soleiðis vórðu søvnini eisini rikin í mong ár – tey vóru mentamál í landspolitikkinum. Men við eitt nú umskipanini av almennu fyrisitingini í nítiárunum, hevur nevnda grundhugsjón í savnsvirkseminum verið fyri broytingum. Dentur hevur verið lagdur á annað enn mentanarpolitikkin, og savnshugsjónin er farin at kámast.

**Søvnini undir Mentamálaráðnum**

Virksemið hjá søvnunum undir Mentamálaráðnum, t.e. Fornminnissavninum, Náttúrugripasavninum, Landsskjalasavninum og Landsbókasavninum, er hjá øllum grundað á savnshugsjón. Men søvnini hava seinastu nógvu árini ikki havt góðar karmar til at røkja savnsuppgávurnar, hvørki viðvíkjandi rakstrarfígging ella hølisumstøðum. Hóast krøvini til søvnini eru økt, er játtanin ikki fylgd við samsvarandi. Goymslurnar og framsýningarhøli eru ikki nøktandi, elektroniskar skrásetingarskipanir eru ikki mentar í nóg stóran mun, og umstøður ikki veittar til tíðarhóskandi miðlan. Harafturímóti hevur verið neyðugt at undirprioritera savnsvirksemið til frama fyri aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hava verið lagdar á søvnini. Fyri at koma aftur á beint við savnshugsjónini er neyðugt við visionerum savnspolitikki og umsitingarligari nýhugsan.

Náttúrugripasavnið, sum hoyrdi til Mentamálaráðið, varð í 2006 lagt undir Innlendismálaráðið, og síðani varð savnið við øðrum stovnum lagt saman í nýggjan stovn, Umhvørvisstovuna, sum umframt náttúrusavnsvirksemi skal taka sær av lendisfyrisiting, fastognarskráseting, umhvørvisgóðkenningum, umsiting av fríøkjum, umhvørvisvernd og gransking innan umhvørvi. Endamálið við at flyta Náttúrugripasavnið í henda stovn var at gagnnýta fakliga førleikan hjá Náttúrugripasavninum í umhvørvisfyrisiting og menna fakumhvørvið innan náttúru- og umhvørvisgransking. Samanleggingin virkaði ikki eftir ætlan, og í september 2008 varð Føroya Náttúrugripasavn flutt aftur til Mentamálaráðið at umsita.

**Havlívfrøðiliga Royndarstøðin (Mentamálaráðið)**

Havlívfrøðiliga Royndarstøðin var ein verkætlan undir Náttúrugripasavninum; men royndarstøðin flutti ikki saman við móðirstovninum undir Umhvørvisstovuna í 2006. Stórur partur av virkseminum hjá Havlívfrøðiligu Royndarstøðini er inntøkufíggjað. Royndarstøðin veitir alivinnuni og øðrum vísindaligar tænastur, sum eru neyðugar fyri umhvørvisgóðkenning teirra. Hetta kann hava verið ein orsøk til, at royndarstøðin ikki flutti saman við móðirstovninum í Umhvørvisstovuna, og at tað hevur verið mett at vera óheppið, um royndarstøðin sum óheft granskingarstova gjørdist ein partur av somu fyrisiting, sum hevur góðkennandi myndugleika á umhvørvisøkinum. Í sambandi við privat fíggjað kanningarvirksemið innsavnar Havlívfrøðiliga Royndarstøðin eisini marinbiologisk kykt og hevur gjøgnum skráseting og gransking upparbeitt eitt savn við grundleggjandi týdningi.

Víst verður til fylgiskjal 1 um Náttúrugripasavnið og Havlívfrøðiligu Royndarstøðina.

**Jarðfeingi (Jarðfrøðisavnið)**

Jarðfrøðisavnið, sum var ein deild á Náttúrugripasavninum, varð í 2000 loyst frá og ment til sjálvstøðugan jarðfrøðiligan kanningarstovn undir Oljumálaráðnum. Tørvur varð á at nýta fakliga førleikan hjá Jarðfrøðisavninum í ráevnisfyrisiting landsins. Primera uppgáva stovnsins var ikki longur grundað í savnshugsjón, men í kanningar- og fyrisitingarvirksemi. Í 2006 vórðu Jarðfrøðisavnið og Oljufyrisitingin løgd saman til Jarðfeingi, sum í dag liggur undir Fiski- og tilfeingismálaráðnum. Eingin ivi er kortini um, at savnshugsjónin framvegis verður vird í virkseminum; men samleiki stovnsins sum savn er vorðin kámur.

**Yvirskipaði bygnaðurin í dag**

Í dag er yvirskipaði bygnaðurin hjá landssøvnunum hesin:



Listasavn Føroya er ikki við í hesi mynd. Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, og kann tí ikki metast sum alment landssavn. Arbeitt verður við at finna eina bygnaðarliga loysn, soleiðis at Listasavn Føroya kann verða knýtt at almenna savnskervinum.

Víst verður til fylgiskjal 2 um Listasavn Føroya.

**Landsgóðkend søvn og onnur søvn**

Ein stórur partur av savnsvirkseminum í Føroyum verður rikin uttan fyri tey almennu søvnini. Tey flestu av søvnunum fáa stuðul úr Landskassanum. Landsgóðkend søvn fáa stuðul sambært løgtingslóggávu og eru undir eftirliti av almennu søvnunum, nevniliga bygdasavnslógini (Ll. 17/1972) og bókasavnslógini (Ll. 79/2001).

Nøkur søvn virka ikki eftir løgtingslóggávu. Av teimum fáa summi almennan stuðul, onnur ikki.

Í fylgiskjali 3 er yvirlit yvir øll søvn í Føroyum, bólkað eftir hesum eyðkennum og um tey reka museumsvirksemi, bókasavnsvirksemi og/ella skjalasavnsvirksemi.

**Góðkend bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi**

19 góðkend bygdasøvn eru í Føroyum í løtuni. Sambært viðmerkingunum til bygdasavnslógina varð í 1972 miðað eftir, at eitt bygdasavn var í hvørjari sýslu. Bygdasøvnini eru so statt fleiri í dag enn upprunaliga ætlað.

Sbrt. bygdasavnslógini fær eitt góðkent savn 60% av rakstrarútreiðslum og 50% av útreiðslum til íløgur endurgoldnar úr Landskassanum. Flestu bygdasøvnini eru sjálvsognarstovnar og summi kommunalir stovnar. Tey virka á sera ymiskum fakligum støði. Nøkur fá hava lønt starvsfólk, tey flestu hava ikki og grunda arbeiðið í áhugafeløgum. Av tí sama er eisini sera ymist, í hvønn mun søvnini liva upp til grundhugsjónirnar fyri savnsvirksemi, ið nevndar vórðu omanfyri.

Ynskiligt er, at bygdasavnsvirksemið gerst meira miðvíst, og mentanarpolitiska endamálið við tí greiðari enn tað er í løtuni.

**Bókasøvn**

15 fólkabókasøvn og 15 skúlabókasøvn eru í Føroyum í løtuni. Harafturat eru fleiri skúlar, ið ynskja at stova skúlabókasøvn, men játtan hevur ikki verið til tøk. Sbrt. bókasavnslógini fær eitt góðkent fólkabókasavn í mesta lagi 40% av rakstrarútreiðslum og 50% av útreiðslum til íløgur endurgoldnar úr Landskassanum. Skúlabókasøvn fáa 60% av ávísum rakstrarútreiðslum endurgoldnar.

Ynskiligt er, at fólkabókasøvnini verða ment, og at eindirnar gerast færri men størri, soleiðis at tænastan á fólkabókasøvnunum gerst betri. Harafturat er ynskiligt, at skúlabókasøvn eru í øllum skúlum við fleiri enn 20 næmingum.

Arbeiðast má við at broyta bókasavnshugburðin í landinum. Hetta gerst lættast við at lata bókasøvnini upp og laga tey eftir samfelagsins viðurskiftum. Lánarin/brúkarin má fáa møguleika at brúka bókasavnstænastuna í nógv størri mun enn higartil. Bókasøvn eru almenn ogn og eru ætlað til almenna nýtslu, sjálvandi undir teimum reglum, sum galdandi eru. Tá ið fíggjarligu karmarnir eru avmarkaðir, má skipast soleiðis fyri, at

so nógv verður fingið burtur úr skipaða tilfarinum, sum gjørligt er. Her verður hugsað um tað almennu bókasavnstænastuna, sum røkku heilt frá vøggustovubarninum til doktaran úti undir vaðingini og øll har ímillum. Í framtíðini er tað ikki ein spurningur um annaðhvørt fisk ella vitanardeplar, vit hava brúk fyri báðum.

Seinastu árini hevur Landsbókasavnið ment eina landsumfatandi elektroniska bókasavnsskipan, sum eigur at hava tað við sær, at innkeyp, klárgerð, skráseting, miðlan og nýtsla av bókasavnstilfari í Føroyum í heila tiki, er nógv meiri tíðarhóskandi. Í dag enn fyri fáum árum síðan.

Málið má vera, at menna bókasøvnini, sum teir vitanardeplar, tey í roynd og veru eru. Tí mugu starvsfólkini á søvnunum fáa bæði sátøðiligar og praktiskar avbjóðingar. Hetta kundi hóskandi farið fram sum eftirútbúgving/útbúgving, sum kundi verið fyriskipað av tí komandi nýggja Fróðskaparsetrinum.

**Onnur søvn**

Søvn í bólkinum ‘‘onnur søvn’’ kunnu sundurbýtast soleiðis:

- Søvn við rakstrarstuðli úr landskassanum, tó uttan við heimild í aðrari løgtingslóggávu enn fíggjarløgtingslógini.
- Søvn, ið ikki verða stuðlað úr landskassanum.

Søvnini, ið fáa rakstrarstuðul, eru listasøvn, nevniliga Skálin við Skálá í Vági og Norðoya Listafelag. Hesi søvn, sum ikki eru yrkissøvn, eru at meta sum sjálvstøðugar samlingar og hava ikki savnshugsjónina omanfyri sum primert mál fyri virkseminum.

Listasavn Føroya, sum er yrkissavn, hoyrir eisini við til henda bólkin, men hevur serstøðu. Frá stovnan í 1948 og fram til 1989 var ‘‘Almennt Føroyskt Listasavn’’ alemnnur stovnur undir Løgtinginum. Listaskálin var sjálvsognarstovnur, sum Listasavnið ikki beinleiðis varðaði av. Í 1989 vóru Almenna Føroyska Listasavnið, Listasavnið hjá Listafelagnum og Listaskálin samskipað í sjálvsognarstovnin Listasavn Føroya.

Meginfíggingin er kortini komin úr Landskassanum við ískoytisfígging frá Tórshavnar Kommunu. Á ein hátt er Listasavnið at fata sum eitt tjóðlistasavn og metir seg eisini sjálvt sum tílíkt. Bygnaðarligu viðurskiftini gera, at tað er ógreitt, hvussu tað skal fatast í almenna savnskervinum.

Søvnini í bólkinum, sum ikki fáa almennan stuðul, eru fýra, nevniliga Bátasavnið í Leirvík, Listasavnið á Sandi, Sjósavn Føroya og Krígssavnið. Tey bæði fyrst nevndu eru ikki yrkissøvn og hava ikki savnshugsjónina sum primert mál fyri virkseminum. Sjósavn Føroya er eitt livandi savn, ið virkar á eksperimentiellum støði við sera áhugaverdum potentiali innan savnshugsjónina omanfyri. Krígssavnið hevur ynski um at gerast góðkent sersavn.

Sersøvn eru eitt øki, ið eigur at verða lýst nærri. Bæði viðv. grundarlagi, ábyrgd, bygnaði, lóggávu, fígging v.m.

**Gongdin viðvíkjandi søvnum**

Gongdin í seinastuni reisir spurningin: Hvat vilja vit við søvnunum? Og hvør er savnspolitikkurin? Vilja vit hava savnshugsjón sum primert áhugamál, ella vilja vit leggja størri dent á onnur áhugamál, soleiðis sum tendensurin í seinastuni hevur verið, og niðurtóna savnshugsjónina sum primert áhugamál?

Gongdin í seinastuni er merkt av pragmatiskum hugsunarhátti, har vit royna at samskipa gagnnýtslu av tí, sum longu er fingið í lag, við tørvin, sum útbygging av samfelagskervinum setur og líkt er til, at vit ynskja at útbyggja fyrisitingarførleika innan tilfeingis- og umhvørvisumsiting og hava í tí sambandi brúk fyri vitan, sum søvnini hava, og granskingarførleikanum, sum savnsvirksemið framleiðir.

Føroya Fróðskaparsetur stendur fyri útbygging, og í tí sambandi hava vit brúk fyri at gagnnýta sama granskingarførleika.

Søvnini hava sostatt uppbygt nakað, sum eftirspurningur er eftir í samfelags-útbyggingini. Spurningurin er kortini, um pragmatiska leiðin, ið vit hava valt, er til gagns fyri savnshugsjónina.

Ásannast kann, at gamla Jarðfrøðisavnið sjálvt hevur havt gagn av at verða lagt saman við ráevnisfyrisiting landsins, tí fakøkið er økt og ment munandi saman við nýggju fyrisitingini, sum hevur verið høgt raðfest øki í landspolitikkinum. Stovnurin hevur samstarv við Náttúrugripasavnið um framsýningarvirksemi og eisini samstarv við Fróðskaparsetrið um gagnnýtslu av granskingarførleika. Í so máta er flytingin frá Náttúrugripasavninum og Mentamálaráðnum til Jarðfeingi og Fiski- og tilfeingismálaráðið væleydnað.

Men spurningurin er, um hetta er ynskiligt fyri samfelagið sum heild. Hóast góðan vilja og góð úrslit, má eisini ásannast, at savnshugsjónin kámast. Stovnssamleikin er ikki longur grundfestur í savnshugsjónini, og vandi er fyri, at fyrisitingarlig áhugamál viga meira í tí gerandisliga.

Skulu vit lata søvn gerast eindir hjá yvirskipaðum fyrisitingum, og harvið lata tey gerast kám í tilvitskuni hjá borgarum landsins, ella skulu vit tríva aftur í aftur savnshugsjónina og aftur reka ein aktivan mentanarpolitikk á økinum? Hetta er ein spurningur um politiskt val.

Hetta tilmælið tekur støði í, at savnshugsjón er eitt grundleggjandi mentanarpolitiskt mál. Tað hevur stóran týdning fyri samfelagsligan trivnað, mentanarligan samleika, og eisini mentanar- og vinnupolitiska hugsjón, hvussu vit síggja okkum sjálvi, og hvussu vit vilja síggjast í eygunum hjá umheiminum í sambandi við avbjóðingarnar, sum alheimsgerðin setur.

Røddir hava verið frammi um, at savnsøkið kann verða lagt undir Fróðskaparsetrið. Høvuðsendamálið við hesum er at vinna gagn burtur úr teirri gransking, sum fer fram á savnsøkinum. Savnsøkið hevur sum nevnt víst seg at hava berandi týdning fyri undirvísingartilboðini hjá Fróðskaparsetrinum. Henda hugsjón røkkur kortini ikki á mál, um hugsað verður um yvirskipaðu savnshugsjónina.

Sum yvirskipað fyrisiting hevur Fróðskaparsetrið onnur primer áhugamál enn savnsáhugamál at taka sær av. Tað kann tæna vísindaligu avbjóðingunum at leggja

savnsøkið undir Fróðskaparsetrið, men øll eru ikki samd, serliga tey, ið starvast innan tøkniliga og pedagogiska partin av savnsvirkseminum og miðlanina. Tey síggja fyri sær, at vísindi verða tikin fram um tað berandi, sum er samanrenningin millum skráseting, vitanarframleiðslu og miðlan, og sostatt, at ójavnvág verður í virkseminum í mun til savnshugsjónina. Við øðrum orðum, at tað ikki tænir hægri undirvísingartilboðunum hjá søvnunum, at gransking verður tikin fram um hinar partarnar av savnshugsjónini.

Í hesum tilmæli verður tikið undir við seinast nevndu hugsjón, at tað er avgerandi fyri savnsvirksemið í Føroyum, at javnvág er millum allar partar av savnshugsjónini. Tá verða tilboðini, sum søvnini kunnu bjóða, ikki avmarkað til ávís skúlastig, men øll stig í undirvísingarkervinum umframt almenningin. Gáað eigur í hesum sambandi eisini at verða um, at søvnini hava potentiali at bjóða øðrvísi tilboð, serliga innan uppliving, sum m.a. eftirspurningur er eftir innan undirvísingarkervið fyri tey veiku í samfelagnum.

Sum vitanarstovnar hava søvnini, ið virka eftir savnshugsjónini sum primert áhugamál, eisini ta styrki, at teir sum stovnar fakliga eru óheftir og tí kunnu veita óhefta ráðgeving, t.d. til fyritøkur ella fyrisitingareindir, bæði privatar og hjá landi og kommunum. At almenn fyrisiting tekur støðu á óheftum grundarlagi hevur avgerandi týdning fyri rættartrygdina í landinum. Miðað eigur tí at verða eftir, at søvnini verða fatað sum vitanarbankar fyri fyrisiting innan mentan, náttúru og list, bæði hjá landi og kommunum.

Samanumtikið verður mett, at tað samfelagsliga fæst mest burtur úr, um tann grundleggjandi savnshugsjónin, ið nevnd er omanfyri, verður hildin sum primert mál í savnspolitikkinum.

**Uppskot**
Við støði í omanfyri standandi er spurningurin nú, hvussu savnsøkið fæst at virka á slíkan hátt, at savnshugsjónin fær størri rúmd í virksemi stovnanna, sum hava søvn, samstundis sum fyrisitingarligu uppgávurnar verða røktar, og granskingin hjá søvnunum eisini verður gagnnýtt í hægru undirvísingini.

Mett verður, at hetta fyrst og fremst verður gjørt við at fáa í lag ein miðvísan mentanarpolitikk á savnsøkinum, sum tekur støði í tí grundleggjandi savnshugsjónini, har innsavning, gransking og miðlan/savnstænasta eru líkastillað mál.

Harnæst verður mett, at tað verður gjørt við at veita savnsvirkseminum tær umstøður, sum eru neyðugar fyri at røkja savnshugsjónina. Uttan góðar umstøður viknar savnsvirksemið, og tað ávirkar bæði fyrisitingarførleika og gagnnýtslu av granskingarførleika, fyri ikki at tala um miðlan og savnstænastu til almeningin.

Skotið verður tí upp, at farið verður undir eina tilgongd, sum verður løgd soleiðis til rættis:

1. Søvnini undir Mentamálaráðnum verða samskipað í eina yvirskipaða fyrisiting, nevnd Søvn Landsins. Fyrisitingarligar uppgávur hjá søvnunum verða lagdar til yvirskipaða Søvn Landsins at umsita.
2. Søvn Landsins umsitur savnshøli hjá Landinum, bæði umsitingarhøli, goymslur og framsýningarhøli. Løgd verður til rættis ein ætlan at betra um hølisumstøðurnar viðvíkjandi framsýningum og goymslum.
3. Søvn Landsins skal vegna landsstýrismannin í mentamálum samskipa savnsvirksemið í Føroyum.
4. Til tess at fáa í lag eina miðvísa ætlan við savnsvirkseminum yvirhøvur, verður farið undir at fyrireika rammulóggávu fyri savnsvirksemið.

**Ad. 1: Søvn Landsins**

Mælt verður til, at søvn landsins verða løgd undir yvirskipaðan stovn fyri savnsvirksemi við heitinum Søvn Landsins.

Við støði í fakligu førleikunum á stovnunum tekur yvirskipaði stovnurin sær av fíggjarfyrisiting og stýrisuppgávum í sambandi við umsiting av lóggávu, sum stovnarnir nú umsita, m.a. fornminnafriðing, stuðli og vegleiðing til landsgóðkend søvn v.m.

Yvirskipaði stovnurin samskipar eisini tað savnsvirksemið, sum er felags fyri stovnarnar: Framsýningar, goymslur og konservering.

Stovnarnir, sum nú eru, verða fakligar eindir. Dentur verður lagdur á, at teir ikki missa sín fakliga samleika hóast samskipanina. Landsskjalasavnið varðveitir navn, ið vísir til, at talan er um landsskjalasavn, o.s.fr., t.d. við tílíkari samanseting: Søvn Landsins, Føroya Landsskjalasavn.

Mælt verður til, at broytingarnar til framtíðar bygnað verða gjørdar lagaliga og mennast líðandi við innanhýsis semju. Hetta verður mett at hava sera stóran týdning, tí stovnarnir eru vitanarstovnar, sum orsakað av trongum fíggjarkarmum í mong ár ikki hava havt nøktandi umstøður at kjølfesta vitanina hjá starvsliðunum við skráseting. Sera umráðandi er at gera íløgur í sterk skrásetingaramboð.

Stovnslóggávurnar verða í fyrstu atløgu ikki broyttar meira enn neyðugt er fyri at veita yvirskipaða stovninum nøktandi heimildir. Yvirskipaði bygnaðurin verður mannaður skjótast gjørligt og skal í fyrstu atløgu leggja til rættis framtíðar bygnað og savnsstrategi.

Skotið verður upp, at bygnaðurin verður nakað sum niðanfyri. Savnsvirksemið verður skipað í eindir, t.e. miðlanartøkniligar eindir og fakeindir sum t.d. við bókasavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi, tjóðminnasavnsvirksemi o.s.fr. Starvsskipanin verður latin upp í hendurnar á nýggjum stjóra at menna, men yvirskipað verður hugsað, at hvør eind verður stýrd av einum deildarstjóra.




Miðað verður eftir, at nýggj vísindastarvsfólk sum frá líður verða sett eftir somu treytum sum vísindastarvsfólk á Fróðskaparsetrinum, t.v.s. eftir skipan, ið við avriksløn fyri menning av granskingarførleika elvir til menning av fakøkinum. Skipað eigur at verða fyri samstarvi við Fróðskaparsetrið soleiðis, at granskingarførleikin eisini kann verða gagnnýttur í undirvísing har.




Skotið verður upp, at avtala verður gjørd yvirskipað um samstarv millum Søvn Landsins og Fróðskaparsetrið í sambandi við granskingargrundaða undirvísing.

Fakeindirnar á Søvn Landsins gera avtalur við megindeildarráðini um gransking og undirvísing á deildunum undir megindeildaráðunum.

**Universitetsbókasavn**
Mælt verður til, at tað verður Landsbókasavnið, ið veitir bókasavnstænastu á Fróðskaparsetrinum í tøttum samstarvi við megindeildarráðini, tvs. at Landsbókasavnið fær støðu sum universitetsbókasavn. Hetta fyri at tryggja eina so góða bókasavnstænastu á Fróðskaparsetirnum sum gjørligt og fyri at tryggja, at tilfeingið verður nýtt á skilabestan hátt. Samstarvið verður avtalað í tí yvirskipaða samstarvinum millum Setursleiðsluna og leiðsluna fyri Søvn Landsins.

Fakeindirnar virka ráðgevandi í mun til fyrisitingarligu myndugleikarnar hjá Føroya Landsstýri. Grundað á kanningarvirkemi veita Fornminnissavnið og Náttúrusavnið ávikavist fornminnafriðingarmyndugleikunum og náttúru- og umhvørvismyndugleikunum ráðgeving og faklig tilmæli. Á henda hátt verður eisini skilnaður millum myndugleikan, ið biður um at fáa eina kanning gjørda, og stovnin, ið ger kanningina.

Søvn Landsins kann eisini veita øðrum stovnum fakliga ráðgeving og tænastu í sambandi við framsýningar og miðlan.

**Ad. 2: Bygningar til felags fyrisiting, goymslur og framsýningar**

Farið verður beinan vegin undir ítøkiliga planlegging av, hvussu hølisumstøðurnar hjá Søvn Landsins skulu vera í framtíðini.

Skotið verður upp, at økið í niðaru Hoydølum verður sett av til Søvn Landsins og ein heildarætlan gjørd fyri fríøkini har og í Hoyvík. Sanatoriið í Hoydølum verður umvælt og nýtt til fyrisitingina hjá Søvn Landsins, og Nýggja Hús, sum brendi í grund í 2007, verður uppafturbygt við somu útsjónd og nýtt til verkstøð. Peningur verður settur av til skitsuprojektering av nýggjari framsýningarhøll í økinum, sum er væl lagað til viðkvæma landslagið.

Ein ætlan verður gjørd um loysn á goymslutørvum savnanna. Bygningurin hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni verður gjørdur til høvuðsgoymslu, tá framsýningarnar har eru fluttar.

**Ad. 3: Samstarv um felags viðurskifti**

Fyri at røkka yvirskipaðu savnshugsjónini skal Søvn Landsins eisini standa fyri samskipan av savnvirksemi, sum aðrir landsstovnar reka, serliga innan miðlan av søvnum og konservering. Gjøgnum stýrisfunktiónir sínar fyriskipar Søvn Landsins eisini savnspolitisku strategiina vegna landsstýrismannin í mentamálum fyri landið sum heild.

**Ad. 4: Rammulóggáva**

Farið verður undir rammulóggávuarbeiði fyri savnsvirksemi í landinum, har endamálið er at fyriskipa

1. Savnindi og vitan um savnindi viðvíkjandi bókmentum, skjølum, náttúru, list og fornminnum.
2. ráðlegging um savnspolitiska strategi millum landið, kommunurnar og onnur, ið virka innan savnsøkið og umsiting av mentanararvi og mentanarumhvørvi.
3. friðing og umsiting av friðing av fysiskum mentanararvi og mentanarumhvørvi.
4. Stuðul til landsgóðkend søvn.

**Tíðarætlan**

Søvn Landsins verður sett á stovn 1. januar 2010.
Savnslóggáva verður fyrireikað at koma í gildi á ólavsøku 2011.

**Kostnaðarætlan**

Samskipanin verður fíggjað við samløguni av teimum játtanum á fíggjarløgtingslógini, sum stovnarnir, ið verða samskipaðir, hava. Nakrar rationaliseringar kunnu gerast í sambandi við samskipanina, men mett verður, at umframt verandi játtanir verður tørvur á meirjáttan til hesi endamál frá ársbyrjan 2010:

| | |
|---|---|
| • Stjóri, akademisk útbúgving innan savnsøkið, 38. lønarflokkur | 650.000 |
| • Fulltrúi | 450.000 |
| • Skrivstovuhald | 200.000 |
| Meirjáttan tilsamans 2010 | 1.300.000 |

Í 2011 verður neyðugt at samskipa teldu- og telefonkervi, útvega felags journalskipan, intranet og annað. Partvís verður hetta fíggjað við spardum útreiðslum á stovunum, men roknast má við eykaútreiðslum í sambandi við umleggingina.

**Fylgiskjal 1:**

**Upprit um samanlegging av Føroya Náttúrugripasavni og Havlívfrøðiligu Royndarstøðini**

**Tilmæli**

1. Mælt verður til, at Føroya Náttúrugripasavn og Havlívfrøðiliga Royndarstøðin verða løgd saman so skjótt sum gjørligt.

**Málslýsing**

Føroya Náttúrugripasavn varð sett á stovn í 1955. Føroya Jarðfrøðisavn, sum var sett á stovn í 1951, var lagt saman við nýggja Náttúrugripasavninum, og stovnurin flutti inn í bygningarnar á Debesartrøð. Náttúrugripasavnið fór undir at byggja upp søvn og framsýningar innan jarðfrøði og djóra- og plantulív.

Náttúrugripasavnið fór í 1987 undir granskingarverkætlanina (BIOlogy of FARoese benthos), sum var eitt samstarv millum norðurlendskar zoologar. Yvirskipaða endamálið við verkætlanini var upprunaliga at fáa eitt yvirlit yvir ryggleysa djóralívið á havbotninum við Føroyar. Eftir at sjálv Biofar verkætlanin varð liðug er virksemi í Kladbak hildið fram undir nøvnunum Biofar royndarstøðin og Havlívfrøðiliga royndarstøðin.

Í 2000 varð Jarðfrøðissavnið skilt frá Náttúrgripasavninum, tí mett var, at oljuumsitingin fór at hava stóran tørv á vitanini á savninum. Avtalað var tó gjørd við Náttúrgripasavnið um samstarv um framsýningarnar. Jarðfrøðissavnið varð í 2005 lagt saman við Oljumálaráðnum í nýggja stovnin Jarðfeingi, sum síðari 2008 hevur verið undir Fiski- og tilfeingismálaráðnum.

Føroya Náttúrugripasavn varð í september 2006 flutt frá Mentamálaráðnum til Innlendismálaráðið, tí tørvur var á at byggja upp eina lendis og umhvørvisfyrisiting. 6 stovnar vórðu lagdir saman. Samanleggingin virkaði ikki eftir ætlan, og Náttúrugripsavnið varð í september 2008 flutt aftur til Mentamálaráðið at umsita.

Náttúrugripasavnið er eitt savn, og er virksemið lýst í § 2 í Løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn:

a) at savna, varðveita og framsýna náttúrugripir, sum lýsa náttúru landsins,
b) at savna, varðveita og handfara náttúruvísindaligt tilfar.

Harafturat hevur savnið sum landsstovnur skyldur í mun til innsavnan og dokumentering av vitan um føroyska samfelagið, eisini sæð yvir eitt langt tíðarskeið. At hesar samfelagligu skyldur verða røktar er eisini við til at geva savninum legitimitet og fakliga styrki sum stovnur.

Sjálvt um Havlívfrøðiliga royndarstøðin, Biofar, í síni tíð varð sett á stovn sum ein verkætlan við tilknýti til Náttúrugripasavnið, varð Biofar ikki flutt við til Innlendismálaráðið í september 2006. Síðani hevur støðan hjá Biofar verið ógreið.

Havlívfrøðiliga royndarstøðin hevur onga serstaka lóg, men í Fíggjarløgtingslógini er virksemið lýst soleiðis:

> *Havlívfrøðiliga royndarstøðin fæst við havlívfrøðiligar kanningar undir Føroyum fyri at fylgja við, hvat hendir við djóralívinum, og ger kanningar av plantu- og djóralívinum úr fjøru og út á størstu dýpi. Granskað verður í lívfrøðiligum fjølbroytni og mannaelvdari ávirkan og avleiðingunum av hesum.*

Tað er avgerandi fyri savnshugsjónina, at allir tættir í savnsvirkseminum verða raðfestir, og ikki bert fyrisitingin ella granskingin.

Biofar- ella Havlívfrøðiliga royndarstøðin - er ein kanningarstovnur /royndarstøð sum hevur uppbygt eitt savn, sum tó ikki verður miðlað. Í mun til savnshugsjónina røkir Havlívfrøðiliga royndarstøðin økini innsavnan, skráseting, gransking og partvís undirvísing, men manglar framsýning og miðlan.

**Niðurstøða**

Tað er tørvurin á at menna fakliga førleikan hjá fyrisitingarligum eindum, sum hevur ført til, at Føroya Náttúrgripasavn varð skilt sundur og flutt frá Mentamálaráðnum. Fyrst Jarðfrøðisavnið í 2000 orsakað av oljufyrisitingini og síðani Náttúrugripasavnið í 2006 orsakað av lendis- og umhvørvisfyrisitingini.

Tað er eyðsýnt, at føroysk fyrisiting hevur tørv á vitan og at menna fakligu førleikarnar á nýggjum fyrisitingarlgum økjum. Hinvegin er eisini neyðugt hjá føroysku tjóðini at hava søvn, sum óheft savna, skráseta, varðveita, granska og miðla mentanar- og náttúruarv okkara.

Nú Náttúrgripasavnið er flutt úr Umhvørvisstovuni aftur til Mentamálaráðið at umsita, er náttúrligt at leggja Biofar og Náttúrgripasavnið saman aftur sum eind undir Søvnum Landsins.

Mælt verður til, at Mentamáladeildin í samráði við Náttúrugripasavnið og Havlívfrøðiligu royndarstøðina tekur stig til samanleggingina.

Mentamáladeildin
AW

**Fylgiskjal 2:**

**Upprit um Listasavn Føroya**

**Tilmæli**

Mælt verður til at arbeiðsbólkur verður settur at viðgera fyrimunir og vansar við at broyta Listasavn Føroya frá sjálvsognarstovni til alment landssavn. Somuleiðis skal arbeiðsbólkurin svara spurningum frá Landsgrannskoðanini um ognar-, játtanar- og roknskaparviðurskifti hjá Listasavni Føroya.

**Málslýsing**

Listasavn Føroya varð skipað sum alment listasavn í 1948 sambært Løgtingssamtykt frá 10. januar 1948 við navninum Alment Føroyskt Listasavn. Fíggjarliga grundarlagið undir savninum var eitt árligt tilskot frá Løgtinginum, umframt gávur og atgongupeningur. Listasavn Føroya er sostatt stovnað áðrenn heimasýrislógin fekk gildi frá 1. apríl 1948, har millum annað søvn eru sermál. Í 1989 varð sjálvsognarstovunurin Listasavn Føroya settur á stovn sum ein samanlegging av:

1. Alment Føroyskt Listasavn, almennur stovnur
2. Listaskálin, sjálvsognarstovnur
3. Savnið av føroyskum listaverkum hjá Listafelag Føroya, privat felag

Í álitinum um landsstovnar og –grunnar frá 2001 verður ein sjálvsognarstovur løgfrøðiliga lýstur sum ‘‘ein, sum eigur seg sjálvan’’, og sum er stovnaður á privatrættarligum grundarlag. Landið eigur ikki stovnin, og kann ikki við lóggávu taka stovnin av, ella ráða yvir ognunum, uttan at koma í stríð við ognarrættin hjá stovninum, sum er tryggjaður í grundlógini.

Listasavnið varð skipað sum sjálsognarstovnur, tí mett varð, at tað í sambandi við útbyggingina av Listasavninum fór at verða lættari at fáa fígging frá pritavum grunnum og øðrum stuðlum, um savnið varð skipað sum sjálvsognarstovnur heldur enn almennur stovur.

Reglugerðin var tó skrivað soleiðis, at landsstýrið skuldi hava avgerandi ávirkan á nevndina. Hetta var gjørt orsakað av, at ognirnar, ið sjálvsognarstovurin yvirtók frá gamla listasavninum vóru almennar, eins og meginparturin av tí, hann nú skuldi umsita var fíggjað úr landskassanum.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár sett spurningar við ognar-, játtanar- og roknskaparviðurskiftini hjá stovninum, men enn er ikki nøkur loysn funnin.

Listasavn Føroya verður mett sum tjóðlistasavn Føroya, men skipanarligu viðurskiftini gera tað trupult at knýta Listasavn Føroya at almenna savnskervi landsins. Ongin lóggáva er, ið skipar viðurskiftini hjá Listasavninum.

**Niðurstøða**

Listasamlingin á Listasavni Føroya er mentanararvur og má metast sum ogn Føroya fólks. Tí eiga ognarviðurskiftini viðvíkjandi savninum at verða fingin í rættlag aftur.

Ein arbeiðsbólkur eigur at verða settur at kanna, hvussu Listasavn Føroya kann skipast sum partur av Søvnum Landsins. Hugt eigur at verða eftir fyrimunum og vansum við:

1. Listasavn Føroya sum alment landssavn
2. Listasavn Føroya sum alment landssavn við tilknýttum sjálvstøðugum virksemi
3. Listasavn Føroya sum sjálvsognarstovnur

Í hesum sambandi skulu viðmerkingarnar frá landsgrannskoðanini um ognar-, játtanar-roknskaparviðurskifti verða havdar í huga.

Mentamáladeildin
AW

# Fylgiskjal 3: Landssøvn, landsgóðkend søvn og onnur søvn

## Hesi søvn virka í Føroyum í dag:

| | **Museum** | | | **Bókasøvn** | **Skjalasøvn** |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Mentanarsøga** | **Náttúrusøga** | **Listasøga** | | |
| **Landsstovnar** | Føroya Fornminnissavn | Føroya Náttúrugripasavn<br><br>Havlívfrøðiliga Royndarstøðin<br>Jarðfeingi (Jarðfrøðisavnið) | | Føroya Landsbókasavn | Føroya Landsskjalasavn |
| **Landsgóðkend søvn (t.e. stovnar við lógarbundnum rætti til stuðul úr landskassanum)** | Vágs Bygdasavn<br>Þorkeris Bygdasavn<br>Fornminnissavnið á Mýri, Hovi<br>Tvøroyrar Bygdasavn<br>Sands Bygdasavn<br>Skopunar Bygdasavn<br>Sandavágs Bygdasavn<br>Miðvágs Bygdasavn<br>Sørvágs Bygdasavn<br>Nólsoyar Bygdasavn<br>Vestmanna Bygdasavn<br>Kollafjarðar Bygdasavn<br>Tórshavnar Býarsavn<br>Eiðis Bygdasavn<br>Leirvíkar Bygdasavn<br>Gøtu Bygdasavn<br>Bygdasavnið "Fornið"<br>Bygdasavnið í Nes kommunu<br>Norðoya Fornminnissavn | | | Bókasavnið í Nes kommunu<br>Tórshavnar Býarbókasavn<br>Fuglafjarðar bókasavn<br>Glyvra bókasavn<br>Gøtu bókasavn<br>Hvalvíkar bókasavn<br>Klaksvíkar bókasavn<br>Kollafjarðar bókasavn<br>Leirvíkar bókasavn<br>Sandavágs-Miðvágs bókasavn<br>Stranda bókasavn<br>Sunda bókasavn<br>Tvøroyrar bókasavn<br>Vágs bókasavn<br>Vestmanna bókasavn<br>Hvalbiar skúlabókasavn<br>Skúlabókasavnið í Hoyvíkar skúla<br>Skúlabókasavnið í Kvívíkar skúla<br>Skúlabókasavnið í Kaldbaks skúla<br>Skúlabókasavnið í Nólsoyar skúla<br>Skúlabókasavnið í Velbastaðar skúla<br>Skúlabókasavnið í Hesti<br>Skúlabókasavnið í Kaldbaks skúla<br>Skúlabókasavnið í Eysturskúlanum<br>Skúlabókasavnið á Felagsskúlanum á Oyrarbakka<br>Skúlabókasavnið í Kommunuskúlanum<br>Bókasavnið í Meginskúlanum á Sandi<br>Skúlabókasavnið í Sankta Frans skúla<br>Skúlabókasavnið í Argja skúla<br>Skúlabókasavnið í Venjingarskúlanum | (Norðoya Fornminnissavn) |
| **Onnur søvn** | | | Listasavn Føroya<br>Skálin við Skálá<br>Norðoya Listafelag<br>Listasavnið á Sandi | | |
| **Onnur søvn (ikki stuðlað)** | Bátasavnið í Leirvík<br>Krígssavnið | Sjósavn Føroya | | | |